Ársfrágreiðingin hjá Fiskimannafelagnum:

# Túralongdin skal inn í sáttmálasamráðingarnar

FISKIVINNA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Túralongdin hjá føroyskum fiskimonnum skal takast við í samráðingarnar um nýggjan sáttmála millum Føroya Fiskimannafelag og Reiðarafelagin. Fiskimannafelagið segði sáttmálan upp 1. desember og hann gongur út 1. februar í komandi ári. Fiskimannafelagið skuldi halda ársfund í Klaksvík í gjár og tá skuldi eisini komandi sáttmanasamráðingarnar takast upp millum limirnar. Hesar reglur er skrivaðar undan fundinum og ivaveður var, tí hetta fyrivarni.

-Sum er kunnu menn haldast umborð í fýra mánaðir, og tað er ongin ivi um, at hetta er ov leingi. Ikki minst, tá menn ofta als ikki sleppa at nerta land. Gongdin í farmaflotanum hevur í fleiri ár verið tann, at útmynstringartíðin hevur verið stytt. Har verður tað av øllum pørtum støðugt meira viðurkent, at teir siglandi eisini hava rætt til eitt heimalív og tí er tíðin umborð stytt samsvarandi,. Sigur formaðurin í Fiskimannafelagnum Óli Jacobsen í ársfrágreiðingini.

### Javning av inntøkum

Fiskimannafelagið góðkennir, at nýttur verður ein nýggjur avrokningarháttur, har inntøkan ikki verður roknað túr fyri túr, men verður javnað yvir eitt nú eitt hálvt ár, summi skip royna longu hesa skipan. Tað vil siga, at tað teir sum eru við teir bestu túrarnar vinna ikki meira enn teir sum eru við ringu ártíðina.

-Okkara støða er tann, at í tann mun, fiskimenn sjálvir eru nøgdir, kann felagið eisini góðkenna, at avroknað verður á hendan hátt. Fortreytin er tó, at menn fáa eina fasta og neyva útgjalding, og at talan er um eina skipaða skiftisskipan fyri manningina, sigur Óli Jacobsen, formaður í ársfrágreiðingini.




*Eitt føroyskt skipaprojekt plaseraði kenda klaksvíksskipið »Ester« í bakborð og nútímasn línubátin Fugltúgvuna í stýriborð í eini skipatekning. Myndin á forsíðuni í ársfráðgreiðingini umboðar Johannu framman og Skansatanga aftan ella okkurt sovorið, skulu vit vera skemtilig. Hon umboðar nýggju og gomlu tíðina og Finnbjørn Hansen hevur teknað.*

### Eftirlonin

Fiskimannafelagið sigur í ársfrágreiðingini, at onki er frætt frá eini lóggávu um eftirløn. Fiskimannafelagið hevur lítla vón um, at ein eftirlønarlóggáva kemur undan komandi løgtingsvali og roknar við, at fleiri ár fara at ganga áðrenn vit fáa eina lóggávu á økinum og tí brynjar Fiskimannafelagið seg til at disponera út frá tí.

-Uttan mun til lóggávu, so er neyðugt at fáa eina eftirlønarskipan, sum báðir partar, reiðarar og fiskimenn skulu gjalda til, sigur Óli Jacobsen, formaður í FF.

-Okkara støða í pensiónsmálinum er, at tað má ikki henda tað saman sum í Íslandi. Har rinda arbeiðarar og arbeiðsgevarar í dýrum dóma inn til eftirlønarskipan hjá fakfeløgum. Men tá avtronar, er ikki so nógv, sum liggur eftir. Tí í næstan sama mun sum løntakarar fáa sína eftirløn, sum teir hava goldið úr egnum lumma, missa teir tilsvarandi av almennu eftirlønini. Vit mugu tryggja okkum, at tað, sum løntakarar fáa í Føroyum, veruliga kemur omaná eina líkinda fólkapensión, sum eigur at gerast ein fastur partur av t.d. eini arbeiðaraløn, sigur Óli Jacobsen í ársfrágreiðingini.

# Ov fáir verkfrøðingar í Føroyum

**Í løtuni lýsir Landsverkfrøðingurin eftir tveimum verkfrøðingum. Annar er til havnadeildina hjá stovninum, meðan hin er til planlegging- og prosjekteringsdeildina. Tað vísir seg tó at vera ógvuliga trupult at fáa verkfrøðingar til slíkt arbeiði í Føroyum, tí ov fáir verkfrøðingar eru til taks**

VERKFRØÐINGAR
*Ingrid Bjarnastein*

Suni Joensen, formaður í Verkfrøðingafelagnum, váttar, at ov fáir verkfrøðingar eru í Føroyum.

- Tað vísir seg at vera ógvuliga trupult at fáa sett verkfrøðingar, sigur Suni Joensen.

– Hví so er, er ilt at siga. Tað er helst nógv forhold, sum gera, at tað verður soleiðis. Til dømis, so halda fleiri av nýútbúnu verkfrøðingunum áfram at arbeiða uttanlands í nøkur ár, ístaðin fyri at koma aftur til Føroya.

Men tó so. Nógvir føroyingar eru niðri í Danmark og lesa til verkfrøðing, og fleiri fara eisini niður hvørt ár. Eisini vera fleiri verkfrøðingar útbúnir hvørt árið, men hvar teir verða av ella um teir koma aftur til Føroya, dugir Suni Joensen ikki at meta um.

– Eitt, sum eisini spælir inn er, at tað er so nógv arbeiði í gongd runt í Føroyum, og tað ger, so at verkfrøðingar eisini velja at fara út á tann privata arbeiðsmarknaðin. Hetta ger so, at tað manglar aðrastaðni.

Um ongin søkir verkfrøðingaarbeiðini, so er tað ongin annar, ið beinleiðis kann taka yvir, tí arbeiðið krevur útbúgving. Spurdur um tilgongdin av verkfrøðingum fer at vaksa komandi árini, sigur Suni Joensen, at dugir hann ikki at siga nakað um.



*Ov fáir verkfrøðingar eru til taks í Føroyum. Ilt er at siga um tilgongdin fer at vaksa í nærmastu framtíð*



Páll Gregersen, Fiskavirkið í Gøtu:

# Gekk væl við saltfiskinum í 2001

**Men einar tveir mánaðir í heyst hevur sølan verið slakari enn vanligt. – Tað gongur upp og niður alla tíðina á flest øllum marknaðum, og vit meta, at hendingin í New York í september og góða veðrið við miðalhavsstrondina í oktober og út í november eru orsøkin til trekleikan á marknaðinum, sigur Páll Gregersen**



*– Her kemur allur fiskurin í bili, og hetta er ein góð skipan. Tú keypir tað, tú skal brúka og ikki tað, tú ikki skal brúka, sigur framleiðsluleiðarin, Páll Gregersen*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Í mong ár hava brosma og longa verið høvuðsfiskasløgini á Fiskavirkinum í Gøtu, og soleiðis er eisini í dag í hesi familjufyritøkuni, sum hevur havt so stóran týdning fyri Gøtu kommunu og tær familjur, sum hava havt sítt livibreyð í fiskiídnaðinum.

Stutt kann sigast, at fiskaframleiðsla hevur sínar traditiónir í Gøtu, og longu í 1929 fór ein bygdafyritøka undir at virka fisk í bygdini. Stjórin á hesi fyritøku kallaðist Jóan Pauli Gregersen, sum var pápi Oddfríð og abbi Páll. Oddfríður legði frá sær sum stjóri fyri fýra árum síðan, 70 ára gamal, og síðan tá hava synirnir rikið virksemið víðari. Skoytast kann uppí, at Oddfríður, sum hevur verið við síðan fyrsti í sekstiárunum, verður 74 ár í februar.

Í dag stendur Páll Gregersen fyri framleiðsluni og søluni, Atli Gregersen fyri alingini og Regin Gregersen í fyrsta lagi fyri tí fíggjarliga partinum.

### Saltfiskur og aling

Høvuðsframleiðslan á Fiskavirkinum í Gøtu er saltfiskur, serliga úr brosmu og longu og partvís toski. Hendan framleiðsla fer serliga til Italiu, men nakað av toski fer til Spaniu.

Virkið sendir eisini regluliga fesk fløk av landinum til keyparar, sum virkið hevur. Hetta eru kongafiskafløk og toskafløk og viðhvørt nakað av upsa- og hýsufløkum. Men Gregersen-menninir hava eisini aling á Gøtuvík. Teir eiga felagið, P/F Luna, og hesin fiskurin verður kruvdur og pakkaður á Fiskavirkinum í Gøtu. Í árinum, sum fer, hava teir tikið 2500 tons av alifiski, og tað ljóðar ikki sum smávegis nøgdir. Millum jól og nýggjárs hava teir eisini tikið nakað av laksi. Virkið kryvur ikki laks hjá øðrum feløgum enn Luna.

– Alingin hevur gingið væl í ár, men nú uppundur ársenda hava prísirnir verið ógvuliga lágir, sigur Páll, sum tó fegnast um, at ILA-sjúkan enn ikki hevur rakt alingina á Gøtuvík.

– Men eingin veit, nær tað kann henda, leggur hann aftrat. Hann sigur, at hóast ráfiskanøgdirnar hjá virkinum eru heldur minni í ár enn í fjør, so er úrslitið í pengum ikki verri, men heldur betur.

– Nógv arbeiði hevur verið á virkinum í árinum, sum fer, til tey umleið 70 fólkini, sum arbeiða hjá okkum, sigur Páll. Hann vísir á, at tað yvirhøvur hevur gingið væl við saltfiskinum, men einar tveir mánaðir í heyst hevur marknaðurin verið trekari enn vanligt.

– Tað gongur upp og niður alla tíðina á flest øllum marknaðum, og vit meta, at hendingin í New York í september og góða veðrið við miðalhavsstrondina í oktober og út í november eru orsøkin til trekleikan, sigur Páll og vísir á, at tá ið veðrið er gott í Italiu og Spaniu verður minni etið av saltfiski.

### Keypa á uppboðssølu

Næstan allur ráfiskurin, sum verður virkaður á Fiskavirkinum í Gøtu, verður keyptur á uppboði.

Tað eru fleiri ár síðan, at nakað skip landaði beinleiðis til virkið í bygdini. Til stuttleikar kann nevnast, at seinasta skipið, sum legði fisk upp í Gøtu, var línuskipið, Mascot av Toftum. Júst, nær tað var, minnist Páll ikki heilt, men hann heldur, tað var fyri ólavsøku í 1996 ella 1997.

– So her kemur allur fiskurin í bili, og hetta er ein góð skipan. Tú keypir tað, tú skal brúka og ikki tað, tú ikki skal brúka, sigur framleiðsluleiðarin.

Nøkur ár herfyri virkaði Fiskavirkið í Gøtu nakað at klippfiski, men henda framleiðsla helt uppat, tá ið bygningurin í Syðrugøtu, sum hýsti hesi framleiðslu, brendi.

– Við teimum prísum, sum eru, dugi eg ikki at síggja, at tað loysir tað seg at framleiða klippfisk í Føroyum, um gerast skulu stórar íløgur. Til tess loysir tað seg betur at virka saltfisk. Men har karmarnir frammanundan eru, er klippfiskurin kanska ein gongd leið, sigur Páll Gregersen.

Á Fiskavirkinum í Gøtu hava teir bygt eitt sindur uppí síðan á ólavsøku. Talan er um eina uppíbygging niðan úr verandi virki, sum skal geva rúm fyri blóðging av alifiski, pakking av laksi og ráfiskagoymslu. Hetta arbeiði verður helst liðugt í januar.



*– Alingin hevur gingið væl í ár, men nú uppundur ársenda hava prísirnir verið ógvuliga lágir, sigur Páll, sum fegnast um, at ILA-sjúkan enn ikki hevur rakt alingina á Gøtuvík*

# Trailari gleið á Sjómansheimið í Havn

FERÐSLUÓHAPP
*Eirikur Lindenskov*

Tað gekst ikki sum ætlað, tá ein stórur trailari var á veg niðan eftir Mylnugøtu í Havn um hálvgum trýtíðina seinnapartin hósdagin. Áðrenn hann náddi niðan á Vaglið, fór hann á glið.

Trailarin gleið á ein bil, sum stóð parkeraður uttan fyri sjómansheimið.

– Bilurin koystist so illa, at hann varð vrak, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

Eingin fólkaskaði var, men á Sjómansheiminum brotnaði ein rútur á Pizzaria, sum er í niðastu hædd.




*Persónbilurin, sum var í millum trailaran og Sjómansheimið, fekk sera stóran skaða*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Konsertir við Musica Viva:

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Í vikuskiftinum fara Nikolaos Kapnas og Jóhannes Andreasen at spæla konsertir við løttum tónleiki í Havn og í Trongisvági. Hetta er eitt slag av nýggjárskonsert við tónleiki fyri violin og klaver eftir m.a. Johann Strauß, Scott Joplin, Wolfgang Amadeus Mozart og Isaac Albeniz.

Konsertirnar verða í Listaskálanum leygardagin 29. desember og í skúlanum í Trongisvági sunnudagin 30. desember. Báðar konsertirnar byrja kl. 16.00, og atgongumerki verða seld við dyrnar.